Kunngerðablaðið A
2009 Hefti 31
ISSN 0907-905X

Nr. 143 23. november 2009

**Kunngerð um broyting í kunngerð um stuðul til útreiðslur til ávísar viðgerðir til børn sambært forsorgarlógini**

**§ 1**

Í kunngerð nr. 44 frá 6. mai 2009 um stuðul til útreiðslur til ávísar viðgerðir til børn sambært forsorgarlógini verður henda broyting gjørd:

Í § 14, 2. pkt. verður „1. januar" broytt til: „1. august".

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Almannamálaráðið, 23. november 2009

**Rósa Samuelsen (sign.)**
landsstýriskvinna

/Eyðun Mohr Hansen (sign.)

## Kunngerð um broyting í kunngerð um koyrikort og koyrifrálæru

### § 1

Í kunngerð nr. 112 frá 29. september 2005 um koyrikort og koyrifrálæru, sum seinast broytt við kunngerð nr. 121 frá 28. september 2009, verður í fylgiskjal 5, nr. **III.** ***Felagsreglur*****, Skúlavognsskelti, lýsingarskelti v.m.** orðað soleiðis:

**„Skúlavognsskelti, lýsingarskelti v.m.**
Motorakfar, traktorar og vognrað skulu undir venjingarrakstri vera útgjørd við hvítum skelti ella skeltum við áskriftini „skúlavognur", ávíkavist „skúlasúkkla", skrivað við svørtum bókstavum.

Skúlaskeltið skal vera ásett lodrætt ella nærum lodrætt og soleiðis, at áskriftin er týðiliga sjónlig, bæði framman og aftan í mun til longdarásin á akfarinum. Skúlaskeltið má bert nýtast undir venjingarrakstri, umframt koyring til og frá staði, har venjingin fer fram.

Meðan verkliga royndin fer fram, kann akfarið hava áskriftir við navni og telefonnummari á skrásettum eigara/nýtara, tó uttan at tilskila navn á koyriskúla ella líknandi. Akfarið má annars undir verkligu royndini ikki á nakran hátt vera merkt við reklamum, lýsingum fyri handlar ella virkir, búmerkjum ella øðrum.

Akfør, sum undan 1. oktober 2009 hava verið merkt við reklamum og tílíkum, kunnu framvegis hava hesi fram til 1. oktober 2011, tá tey skulu verða tikin burtur. Nýggj skeltir mugu tó ikki setast á akfarið.

Verður motorakfar, sum er serliga útgjørt til venjingarrakstur, nýtt til annað endamál enn venjingarrakstur og verkliga koyriroynd, skulu serligu nýtslutólini vera tikin burtur, huld ella læst á tryggan hátt, uttan so er, at eingin situr á plássinum, har hesi tól eru.**"**

### § 2

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, hon er lýst.

Innlendismálaráðið, 23. november 2009

**Annika Olsen (sign.)**
landsstýriskvinna

/Rúni Joensen (sign.)

Nr. 145 25. november 2009

# Kunngerð um gjald til arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn

Við heimild í § 2, stk. 3 í løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 64 frá 25. mai 2009, verður ásett:

**§ 1.** Skyldu at rinda í grunnin hava allir persónar, sum eru undir skattskyldu í Føroyum, og allir arbeiðsgevarar, sum gjalda út A-inntøku.
*Stk. 2.* Persónar, sum eru 67 ár ella eldri, skulu ikki rinda inn í grunnin, og heldur ikki skulu teir rinda tað árið, sum teir fylla 67 ár. Persónar, ið fylla 64 ár 1. juli 2009 ella seinni, sum ikki áður hava havt fastan bústað í Føroyum, rinda einki í grunnin.
*Stk. 3.* Persónar, sum eru avmarkað skattskyldugir til Føroya, rinda tó ikki til grunnin av løn undir FAS skipanini ella av løn umborð á skipum, sum eftir § 2, stk. 1, litra j, 2. pkt. í skattalógini, verða javnmett við skip, ið eru skrásett við heimstaði í Føroyum, og sum, um tey vóru føroysk, lúka treytirnar í § 1, stk. 1 í løgtingslóg um Føroyska Altjóða Skipaskrá.

**§ 2.** Arbeiðsgevari rindar eitt í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn ásett prosent av tí samlaðu útgoldnu A-inntøkuni.
*Stk. 2.* Tá A-inntøka verður rindað, skal arbeiðsgevarin avrokna sín part av gjaldinum til TAKS
1) við at geva TAKS fulltrú til at taka gjaldið av peningastovnskonto hjá viðkomandi, ella
2) við at rinda gjaldið eftir rokning frá TAKS.
*Stk. 3.* Gjaldið eftir rokning frá TAKS skal gjaldast innan 20 dagar eftir, at TAKS hevur sent rokningina.

**§ 3**. Persónar rinda eitt í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn ásett prosent av skattskyldugu inntøkuni. Gjaldið verður kravt inn saman við fyribilsskattinum, og verður endaliga gjørt upp árið eftir í skattauppgerðini.

**§ 4.** Gjøld sambært § 2, sum eru minni enn 50 kr. um árið, verða ikki kravd.

**§ 5.** Verður útrokningargrundarlagið sambært § 2 broytt aftaná, at gjaldið er kravt, verður munurin bert kravdur/útgoldin, um hann er størri enn 50 kr.
*Stk. 2.* Verður inntøkugrundarlagið sambært § 3 broytt aftaná, at gjaldið er kravt, verður munurin bert kravdur/útgoldin, um hann er størri enn 200 kr.

**§ 6.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, men hevur virknað frá 1. juli 2009. Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 147 frá 20. desember 2005 um gjald til arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.

Fíggjarmálaráðið, 25. november 2009

**Jóannes Eidesgaard (sign.)**
landsstýrismaður

/Petur Alberg Lamhauge (sign.)

**Kunngerð
um
útgjald úr arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum**

Við heimild í § 4, stk. 2, § 5, stk. 2, § 8, stk. 2 og § 10A í løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 64 frá 25. mai 2009, verður ásett:

**§ 1.** Arbeiðsmarknaðareftirløn verður goldin úr grunninum við grundarlagi í skrásetingum í Landsfólkayvirlitinum.
*Stk. 2.* Útgjald úr grunninum til persónar, sum eru skrásettir í Landsfólkayvirlitinum við føstum bústaði í Føroyum, verður goldið ókravt frammanundan eina ferð um mánaðin.

**§ 2.** Útgjald til persónar, sum ikki eru skrásettir í Landsfólkayvirlitinum við føstum bústaði í Føroyum, verður útgoldið eftir umsókn.
*Stk. 2.* Útgoldið verður síðst í mánaðinum, eftir at treytirnar eru loknar, galdandi frá 1. í mánaðinum eftir dagfestingina fyri móttøku av umsóknini.
*Stk. 3.* Útgjald til persónar, sum ikki hava fastan bústað í Føroyum er treytað av, at váttan um at persónurin er á lívið, er til skjals og verður endurnýggjað á hvørjum ári.

**§ 3.** Bústaðartíðin í Føroyum verður roknað í árum og mánaðum, sum persónurin hevur verið skrásettur í fólkayvirlitinum í Føroyum við føstum bústaði í Føroyum, tó í mesta lagi 40 ár, lækkað niður til næsta heila tal av árum.

**§ 4.** TAKS stendur fyri útgjaldingini, sum hvønn mánað verður sett á føroyska peningastovnskontu.

**§ 5.** Doyr móttakari aftaná, at arbeiðsmarknaðareftirløn er útgoldin, men áðrenn mánaðurin, sum eftirløn er fyri, er byrjaður, verður eftirlønin ikki afturkravd. Er eftirlønin útgoldin aftaná, at móttakarin er deyður, verður eftirlønin afturkravd.

**§ 6.** Útgjaldingar av arbeiðsmarknaðareftirløn skulu vera til skjals fyri grannskoðara grunsins.

**§ 7.** Avgerðir um útgjald úr grunninum kunnu innan 4 vikur kærast til landsstýrismannin í arbeiðsmarknaðarmálum.
*Stk. 2.* Freistin í stk. 1 verður roknað frá tí degi, kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina.

**§ 8.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, men hevur virknað frá 1. juli 2009.
*Stk. 2.* Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 44 frá 9. mai 1997 um útgjald úr arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum.

Fíggjarmálaráðið, 25. november 2009

**Jóannes Eidesgaard (sign.)**
landsstýrismaður

/Petur Alberg Lamhauge (sign.)

FØROYAPRENT